# 120 almenn arbeiðspláss til Klaksvíkar!

**JÓGVAN SKORHEIM**
Varaborgarstjóri, Klaksvíkar Kommuna



Einki endaligt er greitt enn, hvønn leist samgongan ynskir at arbeiða eftir, tá tosað verður um at leggja út almennar stovnar. Tørvurin á støðugum arbeiðsplássum er avgerandi fyri framtíðina hjá kommununum uttan fyri Suðurstreymoy, og tískil eigur ein býtislykil at verða gjørdur, soleiðis at almennir stovnarnir koma at liggja um alt landið.

Seinastu dagarnar hevur verið frammi í fjølmiðlunum, hvørt tað er rætt at halda almenn arbeiðspláss í Tórshavn, ella um tey skulu leggjast út um landið. Nú er ikki tíð til meiri tos, men heldur gerðir. Vit hava sæð smærri flytingar av almennum arbeiðsplássum, men tíðin er komin at flyta, so tað merkist.

Upplýsast skal, at fyri hvørjar 5 føroyingar, er ein føroyingur í almennum starvi. Um hetta var soleiðis yvir alt landið, hevði Norðoya sýsla havt 120 fleiri almenn arbeiðspláss enn vit hava í dag. Suðurstreymoy hevði mist 658 arbeiðspláss. Hetta er konstatering av veruleikanum.

Eg havi fyrr sagt, at akademiskir havnarmenn ikki kenna fylgjurnar av, at til dømis fiskidagarnir vera skerdir 20%. Hetta segði eg ikki fyri at niðurgera akademikkarar. Heldur vildi eg hava fram, at um allir akademikkararnir búgva í Tórshavn, verður fjølbroytni ov lítið og grundarlagið fyri at taka rættar avgerðir ov snæðurskygt. Tí haldi eg, at einasta rætta er, at fáa almennar stovnar lagdar út á bygdir og býir runt um í Føroyum. Soleiðis fáa vit útbúgvið fólk á allar oyggjar, ið duga at síggja styrkir og veikleikar hjá nærumhvørvinum. Á henda hátt verður tann almenna umsitingin nógv sterkari og nógv fjølbroytnari, enn tað vit kenna í dag.

At fáa útbúgvið fólk at búsetast runt alt landið er ikki bara ein styrki fyri umsitingina, men eisini fyri tað lokala umhvørvið. Eitt nú hevur Klaksvíkin eitt stórt útboð av ymiskum mentanarligum tilboðum, men sum ikki altíð vera gagnnýtt, av tí at vit mangla fólkið, sum arbeiðir frá kl. 08.00 til kl.16.00. Klaksvíkin stendur til reiðar at taka ímóti allari fiskivinnuumsitingini, um tað skal vera, og síggi eg tað ikki, sum meiri enn rímiligt, at vit fáa okkara 120 arbeiðspláss aftrat til Norðoyggjar.

Sum varaborgarstóri fyri Klaksvíkar kommunu kann eg ikki lata hetta sera týdningarmikla mál fara aftur við borðinum, uttan at gera hesar viðmerkingar til tað, ið fram er komið.

# Rós til Rósu

**HELGI ABRAHAMSEN**
løgtingsmaður



**Gjáarmaðurin Sofus Debes Johannesen hevur seinastu mánaðirnar havt nakrar sera góðar og viðkomandi greinar í bløðunum. Tó haldi eg, at tann seinasta greinin við yvirskriftini "Javnaðarflokkurin skapar úrslitini – Sambandsflokkurin fær vinningin" er merkt av sama panikki, sum tíverri hevur rakt fleiri limir í Javnaðarflokkinum ta seinastu tíðina**

Orsøkin til henda panikkin er helst veljarakanningin, sum her fyri gav Javnaðarflokkinum eitt vánaligt úrslit, meðan Sambandsflokkurin fekk størstu framgongdina. Sjálvandi er tað altíð keðiligt at ganga aftur í eini veljarakanning, men sæð í ljósinum av, at tað eru næstan trý ár eftir av valskeiðinum, er eingin orsøk til panikk, tí enn kann nógv broytast.

**5 mánaðir eru ikki 5 ár**

Høvuðsboðskapurin í greinini hjá Sofusi er, at tað er Hans Pauli Strøm, sum hevur skapt allan framburðin, sum er gjørdur á almannaøkinum tey seinnu árini, meðan Rósa Samuelsen bara hevur brotið niður. Tí er hann so fortørnaður um, at veljarin gevur Sambandsflokkinum framgongd og Javnaðarflokkinum afturgongd.

At Hans Pauli Strøm hevur fingið meira á skaftið í fimm ár, enn Rósa Samuelsen hevur fingið á skaftið í 5 mánaðir, er einki at siga til. Vit mugu heldur ikki gloyma, at í teimum fimm árunum hava verið bæði góðar og minni góðar tíðir, meðan teir seinastu fimm mánaðirnir, hava allir verið merktir av eini kreppulíknandi støðu. Tó hevur tað eydnast (ikki bara Rósu og Sambandsflokkinum, men eini breiðari semju, har andstøðuflokkarnir eisini eru við), at økja játtanina til almannamál.

Síðani tann semjan varð gjørd, eru aðrir trupulleikar komnir undan kavi – ikki nýskaptir trupulleikar, men gamlir trupulleikar, sum vóru ókendir í heyst, og hesar trupulleikarnar hevur samgongan nú sett sær fyri at loysa.

**Eingin ger nakað einsamallur**

Í einum demokratiskum samfelag ger eingin politikari nakað einsamallur. Hans Pauli Strøm hækkaði onga játtan einsamallur í árunum 2004 – 2008, og Rósa Samuelsen ræður ongari játtan einsamøll í 2009. Tað sum Hans Pauli Strøm gjørdi í fyrru ABC-samgonguni, gjørdi hann við stuðli frá millum øðrum Sambandsflokkinum, og tað sum Rósa Samuelsen ger nú, er millum annað við stuðli frá Javnaðarflokkinum.

Eg má undirstirka, at umrøddu trupulleikarnir á almannaøkinum eru ikki nýggir. Men tað er nýtt, at nakrir av teimum verða tiknir upp til viðgerð, og vónandi verða teir loystir skjótt.

**Hálvir sannleikar**

Sum dømi um versnaðar umstøður hjá teimum veiku í samfelagnum, sigur Sofus Debes Johannesen, at javningin av pensjónsviðbótini er skorin niður úr 4 til 3 prosent, og at hetta var eitt spariuppskot hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum. Men hann gloymir at siga, at boðini um at spara komu úr Fíggjarmálaráðnum, har ein javnaðarmaður situr á ovastu rók. Fyri at fylgja hesum boðunum arbeiddi Rósa Samuelsen við fleiri spariuppskotum, men okkurt av uppskotunum bleiv vrakað av Javnaðarflokkinum. Millum annað tí endaði sparingin hjá pensjónistunum - tí tað kundi Javnaðarflokkurin ganga við til.

**Samstarv er vegurin fram**

Eg haldi ikki, at vit fáa nakað burturúr at skylda uppá hvønn annan. Vit eru øll partur av somu samgongu, og saman skulu vit finna loysnir.

Eg skal geva Sofusi púra rætt í tí, at Rósa Samuelsen, hesa stuttu tíðina, hon hevur verið í landsstýrinum, hevur ikki loyst allar trupulleikarnar á almannaøkinum. Tað hevði eisini verið ov nógv kravt av henni. Tó haldi eg at hon higartil hevur gjørt eitt gott arbeiðið.

Eg ivist ikki í, at Rósa Samuelsen og Hans Pauli Strøm, við ávikavist almanna- og heilsumálum, saman við allari samgonguni og møguliga eisini andstøðuni, fara at gera eitt gott arbeiði tað ið eftir er av valskeiðinum, og at veljarin fer at løna teimum fyri tað góða úrslitið. So fyribils er eingin orsøk til panikk.

# Næmingar í Vestmanna skúla toppkarakter frá Krabbameinsfelaganum

**Týsdagin handaðu næmingar í 10. flokki í Vestmanna skúla Føroya felag móti krabbameini ein kekk á slakar 72.000 krónur, sum tey høvdu savnað saman til felagið**

Hugflogið kennir eingi mørk, tá ið viljin at hjálpa er til staðar. Av sínum eintingum fóru 10. floks næmingar í Vestmanna skúla herfyri undir eina verkætlan, sum hevði til endamáls at læra, hvussu tað er at savna inn pengar til eitthvørt tiltak. Næmingarnir valdu at stuðla Krabbameinsfelagnum, tí tey hildu tað vera eitt gott endamál. Krabbamein er tann sjúkan, ið rakar flest føroyingar, og øll kenna onkran, sum hevur verið ella er raktur av krabbameini.

Og tað má sigast, at hesir 11 næmingarnir hava dugað væl. Í ymiskum tiltøkum í tveir mánaðir, harav trý vóru rættiliga stór, savnaðu næmingarnir slakar 72.000 krónur inn, sum óskerdir eru latnir Krabbameinsfelagnum. Vestmenningar hava tikið sera væl undir við hesum stiginum, ið næmingarnir hava tikið; bæði privatfólk og fyritøkur hava víst stóran áhuga og stuðlað verkætlanini dyggiliga.

Gjáramorgunin bjóðaðu næmingar til tíðindafundar, har tey løgdu verkætlanina fram fyri næmingum og foreldrum.

- Vit eru sera ovfarin av, hvussu nógv næmingarnir hava gjørt burturúr og hvussu væl tey hava dugað. Umfram stór og smærri tiltøk hava tey skipað fyri mótaframsýning, selt lutaseðlar, eisini umvegis internetið og tá ið stóra stuðulskonsertin var. Undir framløguni av verkætlanin sungu og spældu tey ein sang, sum tey høvdu yrkt um at stuðla Krabbameinsfelagnum, greiðir Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari í Krabbameinsfelagnum, frá.

- Vit høvdu ikki droymt um, at tey gjørdu so nógv burturúr og at tey fóru at fáa so góðan stuðul. Tey hava gjørt eitt ótrúliga stórt og flott arbeiði, sum vit eru sera glað og takksom fyri. Tey hava dugað sera væl at varpa ljós á krabbamein, Krabbameinsfelagnum og marknaðarført tiltakið. Frá okkum fáa tey bert rós og toppkarakter fyri verkætlanina.

Peningurin kemur sera væl við og verður nýttur til tiltøk, sum Krabbameinsfelagið skipar fyri.

Henda verkætlan er heilt víst nakað, ið onnur kunnu læra av og gera teimum eftir, um ikki endiliga at stuðla Krabbameinsfelagnum, so at stuðla øðrum. Haldi at hesir næmingar hava lært so ótrúliga nógv við hesi verkætlan, sum tey ikki hava lært fyrr og neyvan koma at læra við vanligari skúlagongd. Vit siga stóra tøkk!

**V/ Føroya Felag móti Krabbameini**
**Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin